# Nú skal arbeiðast



*– Nú hol er komið á, er bara hjá okkum at fara til arbeiðis av álvara, sigur Heri Ellingsgaard, sum er limur í stýrisbólkinum hjá Klaksvíkar kommunu, sum hevur til endamáls at fyrireika og menna Klaksvík til fasta sambandið*

**Hetta sigur Heri Ellingsgaard, ein av limunum í stýrisbólkinum hjá Klaksvíkar kommunu, sum skal fyrireika Norðoyggjar upp á fasta sambandið um Leirvíksfjørð**

NORÐOYATUNNILIN
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

– Nú mugu vit av álvara fara til arbeiðis við at fyrireika okkum upp á fasta sambandið. Uppgávan hjá okkum higartil hevur verið at sett øll øki undir sjóneykuna fyri at finna tey sterku og veiku liðini, samstundis sum vit hava eygleitt gongdina við at fáa arbeiðið í gongd. Og nú er tað byrjað, so nú er bara at fara í holt við hin partin av álvara, sigur Heri Ellingsgaard.

Endamálið við stýrisbólkinum er, at tey skulu lýsa støðuna á ymsum økjum í Klaksvík og menna tey sum mest og fyrireika upp á fasta sambandið.

Økini sum serliga verður hugt at eru skúlaverkið, heilsuverkið, fíggjarliga økið, handilslívið, vinnulívið og mentanar- tónleika- og ítróttarøkið. Í hesu áðurnevndu er Klaksvík býtt uppí, og so verður farið í djúpdina fyri at finna útav, hvar býurin stendur sterkur, og hvar hann stendur veikur.

– Tað sterka skal styrkjast meira, meðan har vit standa veik, mugu vit gera sum mest fyri at menna økið, áðrenn sambandið er veruleiki, sigur Heri Ellingsgaard.

Heri heldur, at tað er spell, at tað ikki verður byrjað at bora Borðoyarmegin fyrr enn í apríl. Við hesum missir kommunan nógv grót, sum skal nýtast til verkætlanir í Klaksvík, sum standa og bíða eftir, at arbeiðið skal fara í gongd. Millum annað ein útbygging av miðbýnum, sum er rættuliga umfatandi eftir tekningunum.

– Men málið hjá okkum er, at tá tunnilin opnar, er Klaksvík er væl fyri til at taka ímóti teimum avbjóðingum, sum tá liggja fyri framman. Og nú er bara at fara í gongd, tí trý ár ganga skjótt, sigur Heri.

Hann leggur afturat, at nú mugu ítøkilig ting henda á nøkrum økjum, men hann vil ikki koma inn á nakað ávíst beint nú.

– Enn er alt so feskt og nýtt, so tað ber ikki til at siga nakað ítøkiligt her og nú.

# Tunnilsævintýrið er byrjað

**Hósdagur 18. desember var dagurin, tá fyrsta skotið í Norðoyatunlinum varð latið av. Mong skotini eru eftir, men fyri tey mongu, sum á ein ella annan hátt varða av hesi verkætlan, merkir tað, at nú er ikki so longi eftir at bíða til koyrandi er frá meginlandinum til Klaksvíkar og aðrar partar av Norðoyggjum**

NORÐOYATUNNILIN
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*




Ævintýrið, um ein kann kalla tað so, er byrjað. Eitt ævintýr, sum tá tað er liðugt, kostar eitt stað millum 350 og 400 milliónir krónur. Eitt ævintýr, sum fer at hava við sær, at um trý ár verður koyandi millum Eysturoynna og Borðoynna. Nakað, sum serliga norðoyingar hava bíðað í spenningi eftir í langa tíð.

Hósdagin bleiv tað so veruleiki, tá Anfinn Kallsberg trýsti á spreingiknøttin, sum lat tað allarfyrsta skotið av.

Heilt fitt av fólki varð savnað við tunnilsmunnan til hesa hátíðarløtu. Ein frágreiðing var fyrst, síðani fór mannamúgvan nakað burturfrá, meðan skotið varð.

Síðani gingu øll aftur til tunnilsmunnan at hyggja, hvussu tað gekk. Sannur spenningur var millum fólk, og onkur mundi taka sær ein stein at eiga sum minni um hetta fyrsta skotið.

Stutta løtu áðrenn skotið, sást Dúgvan fara úr Leirvík. Hon heilsaði við at floyta tríggjar ferðir. Umborð høvdu teir vónað, at skotið fór at fara av, meðan Dúgvan var beint útfrá staðnum, men so varð kortini ikki. Men Dúgvan fekk tó sent sína heilsu, hon hoyrdist væl og virðiliga.

## Hinumegin í apríl

Lagið var avbera gott millum fólk, og øll fegnaðust um hetta. Kortini varð tosað um ymisk viðurskifti, sum serliga fólk úr norðoyggjum kundu hugsað sær var øðrvísi. Til dømis, at tað ikki var skotið Borðoyarmegin. Men tað ævintýrið má bíða í einar fýra mánaðir afturat. Byrjað at skjóta hinumegin fjørðin verður ikki fyrr enn fyrst í apríl mánaði.

Hetta staðfestir stjórin í p/f Norðoyatunnilin hendan dagin. Leysasøgur hava annars gingið í Klaksvík um, at fyrsta skotið fer at verða latið av longu í januar ella februar. Men hetta avsannar Dávur Reinert Hansen sum sagt. Hann sigur, at ongin onnur dagfesting hevur verið upp á tal uttan hon, sum stendur í sáttmálanum. Og tað er ein av fyrstu døgunum í apríl.









Fleiri hildu tað vera stórt spell, at tað fyrsta skotið ikki varð latið av hinumegin fjørðin, tí tað varð mett, at norðoyingar eru tey, sum hava meira at hátíðarhalda hesum viðvíkjandi enn leirvíkingar. Í øllum førum í fyrstu atløgu. Men hvussu var og ikki, so var lagið avbera gott á øllum teimum mongu, sum hjástødd vóru hesa løtuna.

## Móttøka í bygdarhúsinum

Tá hátíðarløtan var av, koyrdu bussar fólk niðan í bygdarhúsið, har borðreitt varð við pinnamati og øðrum góðum.

Bergur í Garði, nevndarformaður í Norðoyatunlinum, segði nøkur orð. Síðani Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í samferðslumálum og so Jógvan við Keldu, norðoyatingmaður.

Prátið gekk lystiliga millum fólk í bygdarhúsinum. Valprát og tunnilstos, so har var nóg mikið at tosa um.

Men tá klokkan leið móti hálvgum fýra, var tíð hjá summum at gera seg tilreiðar at fara avstað. Teinurin frá bygdarhúsinum til ferjuleguna er langur, so tað endaði við, at onkur mátti renna fyri at náa Dúgvuna. Allarhelst hugsandi, at tí slepst so undan, tá tunnilin er komin.

# Hesaferð skjeyt Anfinn Kallsberg

**- Tað kendist ógvuliga væl at trýsta á knøttin og lata fyrsta skotið av til Norðoyatunnilin, sigur Anfinn Kallsberg, løgmaður, ið hevur verið ein av heitastu talsmonnunum fyri føstum sambandi um Leirvíksfjørð**

NORÐOYATUNNILIN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Hesaferð skjeyt Anfinn Kallsberg. Tað var ein fegin løgmaður, sum læt fyrsta skotið av til fast samband millum Eysturoy og Norðoyggjar*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Tað var ein stór løta í Leirvík seinnapartin hósdagin, tá ið løgmaður, Anfinn Kallsberg, læt fyrsta skotið av til Norðoyatunnilin.

– Jú, tað kendist ógvuliga væl. Hetta var ein stór løta, og tankarnir leitaðu aftur til tíðina, tá ið vit byrjaðu at tosa um hesa stóru verkætlan. Ja, vit skulu heilt aftur í áttatiárini. Tá trúði fáur, at slíkar verkætlanir lótu seg fremja. Eg vil siga, at mong framvegis vóru ivingarsom heilt fram til tíðina, tá ið Vágatunnilin læt upp. Nú vita øll, at slíkar verkætlanir kunnu fremjast, bæði skjótt og væl, og at kostnaðurin er innanfyri rímilig mørk.

## Tung uppgáva

Anfinn sigur, at hann í dag er fegin um, at hann sum fíggjarmálaráðharri kundi vera aktivur á "bananum" í 1998, tá ið undirsjóvartunnilin undir Vestmannasundi aftur varð settur á dagsskránna.

– Tað var ikki nøkur løtt uppgáva at gera politisku semjurnar, sum skuldu til – so stutt eftir búskaparkreppuna, ið samfelagið hevði verið ígjøgnum fá ár frammanundan. Sjálvt um lítil peningur var at arbeiða við, so høvdu vit visjónirnar.

Anfinn sigur, at verkætlanin við undirsjóvartunlinum undir Vestmannasundi eydnaðist betur, enn mangur hevði roknað við.

– Vit vistu, at fór hendan verkætlan at eydnast, fór tað at vera lættari at gera semjurnar um undirsjóvartunnil undir Leirvíksfirði.

## Drønandi "succes"

Fasta sambandið um Vestmannasund gjørdist, sum Anfinn tekur til, ein drønandi "succes", og hetta gav politiska myndugleika gott mót um eisini at fáa í lag fast samband um Leirvíksfjørð.

– Eg vóni, at henda verkætlan, sum nú er í gongd, fer at eydnast líka so væl sum hin fyrra.

Sambært ætlanini, verður koyrandi undir Leirvíksfirði í august mánaði 2006.

Anfinn ivast ikki í, at gongur líka væl við fasta sambandinum um Leirvíksfjørð, sum undirsjóvartunnilin hevur eydnast undir Vestmannasundi, kemur hetta at hava stóran týdning fyri framtíðar útbyggingina av infrastrukturinum í landinum – við føstum sambandi um enn fleiri firðir og sund.

– Tað, sum fyri bert 5-6 árum síðan var púrasta órealistiskt í hugaheiminum hjá mongum, er í dag ein veruleiki, sigur løgmaður, Anfinn Kallsberg.

# Tíggju minuttir til sjúkrahúsið

**Randi í Jógvansstovu, kommunustýrislimur í Leirvík, sigur, at Norðoyatunnilin kemur sanniliga at hava stóran týdning fyri leirvíkingar, tá hann er liðugur**

NORÐOYATUNNILIN
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Randi í Jógvansstovu, kommunustýrislimur í Leirvík, heldur, at tunnilin fer at hava stóran týdning fyri leirvíkingar á fleiri økjum*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

– Tunnilin fer at hava stóran týdning fyri leirvíkingar á fleiri økjum, sigur Randi í Jógvansstovu.

Hon sigur, at Klaksvík og Leirvík hava nøkulunda sama mynstur, tá tað kemur til flakavinnuna og fiskaríið, so hon ivast ikki í, at samstarv á hesum økinum fer at verða, tá tunnilin er liðugur.

– Hugsa tær, vit verða bert einar tíggju minuttir frá sjúkrahúsi. Tað verður ein stór broyting, og tryggleikin í tí verður tað besta, sigur hon.

Eisini dugir hon at ímynda sær, at eitt samstarv á heimarøktarøkinum hevði væl borið til. So at heimarøktin verður býtt upp í størri eindir.

– Hóast vit ikki tosa um kommunusamanlegging, so munnu vit nokk fara at kunna samstarva á fleiri økjum, sigur Randi í Jógvansstovu.

## Trupulleikin

Leirvíkingar eru ónøgdir við, at ferðslan úr tunlinum kemur at ganga gjøgnum bygdina. Randi greiðir frá, at vegurin er júst tann, har nógv børn skulu yvirum, tá tey fara í skúla, so tað sær hon so avgjørt sum ein trupulleika, at ferðslan fer at ganga eftir tí vegnum. Og serliga hugsar hon um ta tungu ferðsluna.

Hon vísir eisini á, at helst fer arbeiðsmynstrið á virkjum í Klaksvík at broytast, tá tunnilin er komin, við at tey fara at arbeiða alt døgnið. Harvið kann væntast, at tann tunga ferðslan somuleiðis fer at koyra nógv um náttina, og tað fer uttan iva at órógva náttarfriðin hjá teimum, sum búgva við hendan vegin, heldur Randi.

Hon sigur, at leirvíkingar hava álit á, at tað sum teimum er lovað, verður gjørt. Og tað er, at royndarboringar verða gjørdar undir Leirvíksbygd komandi ár, sum liður í kanningum til ein møguligan tunnil undir bygdina.

# Steinbjørn fegnast – men…



*Borgarstjórin í Klaksvík, Steinbjørn Jacobsen, er avbera fegin um, at arbeiðið við tunlinum nú av álvara er farið í gongd, men hann dylir ikki fyri, at hann hevði viljað, at tað byrjaði hinumegin fjørðin samstundis*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**– Sjálvandi eri eg glaður um, at arbeiðið nú er byrjað. Men tað besta hevði verið, um tað var byrjað í báðum støðum ísenn. Verkætlanir í Klaksvík bíða eftir grótinum, og tað órógvar, sigur borgarstjórin í Klaksvík, Steinbjørn Jacobsen**

NORÐOYATUNNILIN
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

– Nú er arbeiðið byrjað, so nú kunnu vit veruliga fara at gleða okkum til tað fasta sambandið kemur, sigur Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík.

Men hann harmast samstundis um, at tað ikki verður byrjað í Klaksvík fyrr enn um fýra mánaðir. Hetta hevur við sær, at verkætlanir, sum kommunan hevur koyrandi liggja í bíðustøðu.

Til dømis bjóðaði kommuna arbeiðið við at gera góðshavnina í Ánunum út fyrr í ár, og J og K Petersen fingu arbeiðið. Teir standa nú í eini bíðistøðu, tí onki grót er til taks.

– Vit fáa onki gjørt við hetta, og tað harmar meg almikið, sigur borgarstjórin, sum er nakað ónøgdur við óliviligu støðuna.

Kommunan liggur í samráðingum um at fáa grót, sum kemur úr tunlinum nú Eysturoyarmegin, men hetta fer at kosta kommununi fleiri milliónir eyka í flutningi av gróti um fjørðin, og tí kemur tað serstakliga illa við hjá Klaksvíkar kommunu, at tað ikki verður byrjað fyrr enn í apríl.

– Hesir fýra mánaðirnir hava eisini við sær, at tað verður tað minni av gróti í okkara part. Og kommunan skríggjar eftir gróti bæði til góðhavnina og til miðbýin, sum jú skal gerast, greiðir Steinbjørn frá.

## Styrkt øki

Borgarstjórin í Klaksvík væntar, at tað fer at styrkja Klaksvík, at bygdir sum Leirvík, Gøta og Fuglafjørður koma so nógv nærri. Hann vísir á vinnuligar og útbúgvingarligar fyrimunir við hesum.

– Tað er ongin ivi um, at tað standa stórar avbjóðingar fyri framman, og vit mugu spenna okkum út fyri at vera kappingarfør, men eg eri sannførdur um, at við samstarvi millum kommunurnar, verður økið munandi styrkt.

Samskifti millum serliga kommunurnar í Leirvík og Klaksvík hevur verið nógv og gott hesa seinastu tíðina, og tað fegnast Steinbjørn eisini um.

– Vit hava tosað nógv um ymiskar samstarvsmøguleikar, tá tunnilin er opnaður, og tað ljóðar spennandi, sigur Steinbjørn uttan at koma inn á nakað ítøkiligt.

Hann er bara sum allir aðrir norðoyingar, sigur hann. Fegin um, at arbeiðið er byrjað, men samstundis harmur um, at tað ikki kundi byrja Borðoyarmegin samstundis.